| INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
| --- | --- |
| Mál nr.: | 1836-011/08 |
| Góðkent: | 29/1-09 |
| Dagfesting: | 29/1-09 |
| Váttað: | [signature] |

# SERSTØK

# BYGGISAMTYKT

# FYRI

# MIÐVÁGS KOMMUNU

**Nýggja útstykkingin í Vatnsoyrum.**

Partur av landbúnaðarøki í Vatnsoyrum, (sí hjáløgdu tekning), verður broyt til serstaka byggisamtykt fyri sethús. (B2)

**Byggistig:**

- Hægst loyvda byggistig er 0,3 íroknað møguligt bilhús ella úthús.

**Nýtingarstig:**

- Hægst loyvda nýtingarstig er ikki ásett, men er nýtingarstigið avmarkað við ásetingum um byggilinju og hæddarviðurskiftir.

**Fráleikar:**

**Stykkið:**

- Byggjast skal innanfyri byggilinjuna.
- Frástøða frá grannamarki skal í minsta lagi vera 3 m.
- Byggifeltið er avmarkað til, at byggjast kann í mesta lagi 7,5 m uppat byggilinju móti síðugranna, og er byggifeltið haðani 5.5 m niðaneftir avmarkað við 45 gr. avsneiðing.
- Úthang (takskegg) kann í mesta lagi stinga 0,5 m út um ásettu byggilinju.
- Aðrir bygningspartar vera at halda seg innanfyri ásetta byggilinju.

**Byggihædd:**

- Hædd frá gongubreytakanti á atkomuvegi miðskeiðis um stykkið og upp til yvirgrind (stern) má í mesta lagi vera 7,4 m.
- Hædd frá gongubreytakanti á atkomuvegi miðskeiðis um stykkið og upp til mønu, má í mesta lagi vera 9,7 m.
- Hæddarlinjan millum hægstu mønu og hægstu yvirgrind (stern) tekur støði í, at mønan er 4,5 m frá byggjulinju móti vegi.

**Tilvísingar:**

Sí hjáskjøl .

1. Byggihædd.
2. Byggistig og fráleikar.
3. B-øki við typu av stykkum.
4. Dømi 1.
5. Dømi 2.
6. Yvirlitsplanur.

Víst verður annars til almennu byggisamtyktina.

**Samtyktar- og góðkenningaráteknig.**

Soleiðis samtykt av Miðvágs bygdaráð

Miðvágs Kommuna, Miðvági hin 03. juni 2008.

Johannes Klein, borgarstj.

Georg Hansen, skr.

Sambært gr. 4, stk. 1. í løgtingslógini um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 við seinri broytingum, góðkennir Løgmálaráðið frammanfyristandandi av Miðvágs bygdaráð samtykta uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Miðvágs Kommunu.

Løgmálaráðið ______/______ 2008.

**Hjáskjal 1.**

**Bygglhædd**



# Hjáskal 2
## Byggistig & fráleikar







Hjáskjal 3
P
1
2
B2
1
1
2
1
P
1
1
B2-øki
Nýggja útstykkingin i
Vatnsoyrum
Mát: 1:1000
Dagf. 28.05.2008
N


Hjáskjal 4
P
P
Dømi 1
Nýggja útstykkingin í
Vatnsoyrum
Mát: 1:1000
Dagf. 28.05.2008
N


Hjáskjal 5
P
P
Dømi 2
Nýggja útstykkingin í
Vatnsoyrum
Mát: 1:1000
Dagf. 28.05.2008
N

# MIÐVÁGS KOMMUNA

## BYGGISAMTYKT OG BÝARSKIPAN 2008

| | |
|---|---|
| A | MIÐSTAÐAENDAMÁL |
| B | SETHÚS |
| C | VINNUENDAMÁL |
| E | ALMENNIR STOVNAR |
| F | ALMENN FRÍTÍÐARØKI |
| H | FRÍLENDI |




Mai 2008

M = 1:5.000